HOYVÍKAR SKÚLI

# Ársfrágreiðing 2024

1. Januar 2023 er leiðsluskifti í Hoyvíkar skúla. Hans Jón Thomsen er farin í farloyvi frá skúlastjórastarvinum, og varaskúlastjórin,  Jens á Skipagøtu tekur við skúlastjórastarvinum. Malan á Dul Nielsen verður nýggjur varaskúlastjóri.
   Tá nýggj leiðsla tók við, bleiv beinanvegin tosað um at gera nakrar bygnaðarbroytingar, soleiðis, at Hoyvíkar skúli bleiv tvey-sporaður skúli longu frá 1. flokki. Hetta bleiv sett í verk skúlaárið 2023/2024 og tað vísir seg at vera røtt avgerð, og vit ætla at halda fram við hesum leistinum.

   Leiðsluskifti var aftur hálvan septembur 2024. Jens á Skipagøtu segði seg úr starvi sum skúlastjóri og Hans Jón Thomsen segði seg endaliga úr starvi. Anna Maria Reinert Jensen bleiv sett sum nýggjur skúlastjóri í Hoyvíkar skúla og 1. Januar 2024 fekk Malan á Dul Nielsen fast starv sum varaskúlastjóri.

   Matpakkin.fo gavst við sínari veiting við ársbyrjan 2023, men seinni kom mál við nýggjari tænastu. Hetta var fyrst ein royndartíð, men vit eru nøgd við nýggja veitaran, og mál heldur fram við virkseminum.

Tað verður framvegis tosað um um/nýbygging av Hoyvíkar skúla. Til projektlýsingina at definera røttu loysnina eru 3. mió. settar av. Sigast skal, at bíðað verður enn eftir røttu loysnini, um, hvar vit skulu hýsast, meðan bygt verður. Hoydalar er upp á tal, og um tað ikki letur seg gera, so er kanska møguligt at leiga pavilliongir at húsast í, meðan bygt verður. Vit skulu hava eina prognosu um næmingatal, so vit vita, um skúlin skal vera 2. spor ella 3. spor. Tey tølini eru ikki tillutað, so politikkararnir fáa tikið eina avgerð. Vissi Hoyvíkar skúli ikki fær hýsing nakra aðra staðni, jamen so má nýggjur skúli byggjast aðra staðni. Hetta skal umsitingin eisini taka støðu til, áðrenn politikkararnir fáa tikið avgerð. Tað er upp á tal, at sertilboðið skal byggjast út í sambandi við um/nýbyggingina. Av tí, at lítið og einki hendir í málinum um nýggjan skúla, er trupult at vita, hvat mann skal investera í av nýggjum møblum og í skúlagarðin, tí tað mann keypir nú, skal helst takast við í nýggja skúlan.

Nýggir møblar, ið verða keyptir skulu kunna brúkast í nýggja skúlanum eisini. Vit hava fingið eina játtan á 150.000kr til innbúgv, og vit hava keypt 6 sofur og 3 borð, sum næmingar kunnu sita og arbeiða í í pyramiduhøllini og bókasavninum. Hetta sær út at eydnast væl. Umframt tað hava vit skift møblarnar í starvsfólkahølinum út, soleiðis at øll fáa sitið inn har í senn.

Á várið 2023 var borgarstjórin við umsiting og arkitekti og vitjaði Hoyvíkar skúla. Lovað varð, at eitt skitsuprojekt til nýggjan skúla skuldi fyriliggja áðrenn summarferiuna. Vit bíða enn, hóast vit hava fingið at vita, at tekningar eru á veg.

1. mars 2023 var skúlastýrisfundur saman við Skúlanum við løgmannabreyt. Tosað varð m.a. um forskúla. Tosið um forskúla hevur fylgt nakað seinasta árið. m.a. tí, at politiskt hevur Tórshavnar Kommnuna sagt, at øll øki skulu hava forskúla, og tí, at kommunan hevur sagt, at tey sum ganga í forskúla hava fyrsta rætt til at sleppa í 1. flokk. Trupulleikin í Hoyvíkini er tann, at hølisviðurskiftini eru ikki til forskúla í hvørgum skúla, og tí er spurningurin ikki so relevantur, fyrrenn hølisviðurskiftini eru nøktandi. Vit høvdu dialogfund við kommununa í novembur, og tá bleiv málið eisini tikið upp.

Tosað hevur verið um samstarv millum skúlarnar um vallærugrein, og tað er enn eingin loysn komin um, júst hvussu hetta skal gerast.

Ferðsluviðurskiftini rundan um báðar skúlarnar, serliga av og á skipanin og útkoyringin frá Løgmannabreyt út á Vegin Langa, hava fylgt nógv seinasta árið, tó uttan úrslit. Eisini kom fram, at tað er upplagt at vera felags um foreldratiltøkini, tí børnini í báðum skúlunum koma í somu støð í frítíðini.

Viðvíkjandi næmingaráðnum eru vit í einari uppbyggingarfasu, og vit mugu ásanna, at arbeiðið við næmingaráðnum er dottið niðurfyri av ymsum orsøkum.

Á heysti 2023 skipaði skúlastýrið fyri tiltaki um rúsevni við Erling Fles. Tiltakið var væl vitjað og var væl eydnað.

Interaktivar talvur eru nú settar upp alla staðni. Hetta er innan fyri núverandi fíggjarkarmar, hóast kommunan hevur lovað at koma við einari eykajáttan. Hetta kann koma at ávirka fíggjarviðurskiftini hjá skúlanum tann skeiva vegin.

Tað er strammað upp í telefonpolitikkinum, soleiðis, at telefonir nú skulu latast lærarunum um morgunin, og læsast inni í einum skápi, til skúladagurin er av. Vera reglurnar ikki fylgdar, verður telefonin latin skrivstovuni, og so skulu foreldrini heinta telefonirnar. Hetta eydnast væl, og hetta eru vit, sum skúli glað fyri.

Skúlin hevur eina trivnaðarætlan, sum er tøk hjá lærarunum. Talan hevur verið um at leggja hana á heimasíðuna og gera hana sjónligari, men vit eru ikki komin víðari við tí. Hetta hevur verið uppi at venda, tí skúlin hevur verið noyddur at gera serlig inntriv í onkrar flokkar, har trivnaðartrupulleikarnir hava verið nokk so stórir. Inntrivini vísa seg at hava gjørt mun.

Í heyst fekk skúlin einglavitjan. Limir í skúlastýrinum stóðu uttan fyri skúlan við einglaveingjum tveir morgnar og góvu næmingunum endurskin. Hetta eydnaðist væl, og mann heldur, at hetta burdi verið eitt afturvendandi tiltak hvørt ár. Hesar morgnarnar legði mann serliga væl merki til ferðsluruðuleikan vestarumegin.

Í heyst er skúlin eisini farin undir at skráseta fráveru hjá næmingum í kervi hvønn tíma. Eisini í grund- og miðdeildini. Skúlin hevur í hesum sambandi gjørt mannagongdir, hvussu vit gera, um fráveran gerst ov høg hjá næmingunum. Vit hava valt at gera hetta fyri at vita, um vit kunnu minka um fráveruna hjá næmingum. Í vetur var skúlin hart raktur av sjúkraskrivingum og sjúku sum heild av starvsfólki, og tí eru vit eisini farin, útførliga, farin undir at at føra fráveruna hjá lærarum í kervi, og vit royna at leggja dent á, at starvsfólk og næmingar helst ikki skulu keypa sær frí fyri at tryggja støðuga undirvísing.

Skúlin hevur eisini eina mannagongd, har næmingar koma inn til leiðsluna at vera, um teir órógva undirvísingina ov illa. Um hetta hendir so og so ofta verður ringt eftir foreldrunum. Og blívur hetta við, so verður okkurt meiri drastiskt gjørt.

Eftir eitt sindur av umhugsarnartíð bleiv avgjørt at hava jólahaldið í kirkjuni. Um morgunin høvdu vit eitt jólahald fyri ommum og abbum, og bæði jólahaldini eydnaðust væl, men onkrar broytingar eru upp á tal til komandi ár.

Talið á innskrivingini til 1. flokk er høg, og tað eru vit glað fyri. Onkur kom á bíðilista, men tað er blivið pláss fyri teimum eisini, tí onkur er hoppaður frá aftur.

Vit kundu hugsað okkum at gjørt eitt skriv um, hvussu vit gera, tá eitt nýtt barn skal byrja í Hoyvíkar skúla. Her er serliga talan um næmingar, sum koma mitt í skúlaárinum.

Evnisvikan í vár eydnaðist ómetaliga væl. Dentur varð lagdur á handaligu lærugreinarnar, og næmingar valdu seg inn á verkstøð.

Sosiala deild fer aftur at seta í verk at vitja skúlarnar eina ferð um mánaðin/6. hvørja viku. Hetta eru vit glað fyri. Her kann mann seta spurningar um ymiskt, mann ivast í og fáa vegleiðing.

Talið á flóttum úr Ukraina hækkar, og sum støðan er nú, er ikki pláss fyri fleiri í Eysturskúlanum, so vit kunnu fyrireika okkum upp á, at vit møguliga fáa nakrar komandi skúlaár.

Fundur var við trivnaðarumboðini í vár. Ymiskt av tí, sum kom fram sæst í fundarfrágreiðingini frá 7. mars 2024.